HEILSUFRØÐILIGA STARVSSTOVAN

Tórshavn hin 9. apríl 1997
Málnr.: 616-97-0001 
Saksv.: Bryndis á Dunga

Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin
520 Leirvík

## Umhvørvisgóðkenning til móttøkupláss fyri spillvatnsevju

Í skrivi dagf. 14. februar 1997, søkir Interkommunali Renovatiónsfelagsskapurin (IRF) um umhvørvisgóðkenning samb. grein 26 í umhvørvisverndarlógini um sertiga dálkandi virki, til at gera eitt móttøkupláss inni á Grótbrotinum á Gjánoyri til goymslu av spillvatnsevju

## Málsviðgerð

**Skjøl sum eru nýtt í góðkenningini:**

- Umsókn frá IRF, dagfest 14. februar 1997
- Tekning nr. 01, støðu- og kloakkmynd, dagfest 1. februar 1997
- Tekning nr. 02, prinsippskurður í móttøkubrunn, dagfest 1. februar 1997
- Tekning nr. 00, støðutekning 2. februar 1997
- Uppskot til skipan fyri tømning v.m. av rottangum og reinsiverkum hjá IRF (Jan. / 1995)
- Uppskot um reglugerð fyri rottangaplássið á Gjánoyri, dagfest 7. februar 1997
- Faldari um Moos KSA skipanina

**Um evjuplássið:**

Nýggja evjuplássið til spillvatnsevju er innrættað í Grótbrotinum á Gjánoyri. Norðasti parturin av plássinum verður innrættaður við tveimum rottangabrunnum á 940 $m^2$ og einum spulipláti, meðan sunnari parturin kann nýtast til moldgoymslu. Evjuøkið er tilsamans 1880 $m^2$ til støddar.

Evjan skal liggja á goymslu í móttøkubrunnunum í uml. 2 ár, áðrenn hon kann nýtast sum áskot t.d. á einum tyrvingarplássið

Brunnveggirnir verða steyptir upp, og net spent uppiyvir øllum økinum fyri at halda fuglí burtur

Økið verður inngirt av 2 m høgum hegni við portri

Debesartrøð

FR-100 Tórshavn

Faroe Islands

Tel. +298 1 55 90

Fax. +298 1 09 05

**Upplýsingar um dálking og dálkingaravmarkandi atgerðir:**
Á botninum á báðum brunninum verður eitt drenlag gjørt av grót. Drenvatnið frá báðum brunninum verður leidd burtur frá økinum ígjøgnum rørleiðing í ein samlibrunn, ið er felags fyri báði evjuøkini og í lokaðum rørum beinleiðis á sjógv.
Frárensl frá økinum omanfyri grótbrotið, verður leitt uttanum økið, soleiðis at bert drenvatnið frá sjálvum evjuplássinum kemur frá økinum.

## Góðkenningartreytir

Grundað á fyriliggjandi upplýsingar, innretting og rakstur av evjuøkinum inni á Grótbrotinum á Gjánoyri, gevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan, samb. grein 26 í lóg nr. 134 frá 29. okt. 1988 um umhvørvisvernd og kunngerð nr. 186 frá 5. november 1993 um spillvatnsevju, Interkommunala Renovatiónsfelagsskapinum (IRF) góðkenning til at gera og reka eitt móttøkupláss fyri spillvatnsevju undir fylgjandi treytum:

**Innrætting:**

1. Økið, sum nýtt verður til goymslu av spillvatnsevju, skal vera innanfyri umgirdað økið í Grótbrotinum á Gjánoyri samb. ávísta tekning nr. 01, dagfest 1. februar 1997
2. Hegn skal setast upp rundan um plássini
3. Botnurin á brunnunum skal verða innrættaðir við einum væl virkandi drenlagi, ið er minst 10 cm tjúkt
4. Øll frárenning frá spúliplattinum, móttøku- og goymsluplássinum skal innilokað leiðast í ein felags botnfellingarbrunn og leiðast í rør beinleiðis út á streymasjógv
5. Møguleiki skal verða fyri sýnistøku av frárensivatni aftaná botnfellingarbrunnin
6. Brunnveggir rundan um evjuplássini skulu verða úr tættum tilfari, sum tryggja at vatn ikki setir út úr brunninum
7. Yvirflatuvatn frá økinum omanfyri skal leiðast uttanum evjuplássið
8. Tráður ella net skal spennast yvir økini, sum er so tættur, at fuglur ikki sleppur at evjuni
9. Neyðugur vaskiútbúnaður skal vera á økinum

**Rakstur:**

1. Bert spillvatnsevja má viðgerast á plássinum
2. Bind o.a. skal skiljast frá evjuni og beinast á brennistøðina
3. Lagið av evju í lagunum skal altíð vera minst 1 metur undir brunnkantinum
4. Evjan skal sóttreinsast við kálki, soleiðis at pH er omanfyri 11, áðrenn hon verður løgd út á evjuplássið (t.v.s. umleið 300 g pr. kg. turrevju)
5. Botnfellingarbrunnur skal eftirhyggjast javnan, og tømast so ofta neyðugt er
6. Rottangabilurin skal, tá ið hann ikki er í nýtslu, standa læstur inni á evjuplássinum ella á øðrum hóskandi staði góðkent av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

**Innaneftirlit:**

1. IRF skal á hvørjum ári gera mikrobiologiskar og kemiskar kanningar av evjuni. Sýnini skulu takast 20 og 80 cm undir yvirflatu. Kanningarætlanin skal gerast í samráð við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna.
2. IRF skal á hvørjum árið gera mikrobiologiskar og kemiskar kanningar av frárenslinum frá plássinum. Kanningarnar skulu gerast av einari av Heilsufrøðiligu Starvsstovu góðkendari starvsstovu
3. Rakstrarbók skal førast yvir móttiknar nøgdir, og skal Heilsufrøðiliga Starvsstovan í januar mánaða á hvørjum ári hava fráboðan um móttiknar nøgdir frá undanfarna ári
4. IRF ber allan kostnaðin av rakstrinum av plássinum
5. IRF hevur ábyrgdina av, at evjuplássini verða innrættað og rikin sambært treytunum í hesi góðkenning

**Kanningar:**

1. Evjan skal kannast fyri:

* Biologi: Coliformar bakteriur, streptokokkar og salmonella (og møguliga parasitt-egg og ormar)
* Kemi: Turrevni, Tot-N, Tot-P, Kalium, Kalsium, Magnesium, Pb, Cd og Hg

2. Frárenslið skal kannast fyri:

* Biologi: Coliformar bakteriur, streptokokkar og salmonella
* Kemi: pH, Tot-N og Tot-P, botnfelligar evni, suspenderað evni og flótingar evni

## Góðkenning

Tá evjuplássið er klárt at taka í nýtslu, skal eftirlitsmyndugleikin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni fráboðast, so trygd fæst fyri, at ásetingarnar í góðkenningini eru fylgdar, áðrenn raksturin á økinum byrjar.

Skal avvatnaða lagraða evjan nýtast t.d. at tyrva við, skal søkjast um serskilda góðkenning.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur eftirlitið við evjuøkinum. Eftirlitið verður útint samb. kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

Eftirlitsmyndugleikin hevur til eina og hvørja tíð heimild at kanna viðurskiftini á evjuplássinum og gera vart við møguligar skeivleikar og krevja neyðugar broytingar hesum viðvíkjandi.

Sambært § 26 í umhvørvisverndarlógini má virkið ikki víðkast ella broytast byggitøkniliga ella rakstrarliga á ein hátt, ið hevur ávirkan á dálkingarviðurskiftini hjá virkinum, fyrr enn víðkanin ella broytingin er góðkend.

**Tíðaravmarking:**
Hendan góðkenning er galdandi í 5 ár.

Umsókn um nýggja góðkenning skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni í seinasta lagi ½ ár áðrenn, hendan góðkenning gongur út

Góðkenningin fríheldur tó ikki fyri at søkja onnur neyðug loyvi hesum viðvíkjandi.

**Kæra:**
Avgerðir tiknar av Heilsufrøðiligu Starvsstovuni kunnu sambært § 66 í umhvørvisverndarlógini kærast til Føroya Landsstýri. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, avgerðin er almannakunngjørd. Kæran skal sendast Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, sum síðan sendir kæruna til Føroya Landsstýri.

Tórshavn, tann 9. apríl 1997

Vinarliga

Bárður Enni
Stjóri

Jákob Pauli Joensen
Deildarleiðari

Avrit: Hvalvíkar Kommuna
Felagskommunala Nevndin í Sundalagnum
Landslæknin